# Silja Star framvegis til umvælingar

**Hóast tað nú eru nærum tríggir mánaðar, síðani at nýggi útferðarbáturin hjá Palla Lamhauge í Vestmanna, Silja Star, rendi á og fekk stóran skaða, eru umvælingarnar framvegis ikki lidnar**

FERÐAVINNA

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Palli Lamhauge sigur, at báturin, sum er til umvælingar í Noregi, herfyri var ein túr og royndi nakrar skrúvur, men tær blivu ikki mettar at verða nøktandi.

## Kappingin er hørð

Tískil skal Silja Star hava nýggjar skrúvur, men nær arbeiðið upp á bátin er endaliga liðugt, dugir Palli Lamhauge ikki at siga.

– Tað gongur ivaleyst ein tíð, og tað er ilt at siga, nær Silja Star verður klár, sigur ferðavinnuveteranurin.

Palli Lamhauge sigur, at missurin av Silju Star hevur verið ein dyggur smeitur, tí kappingin um ferðafólkini er sera hørð í Vestmanna. Harafturat hendi óhappið fyrst í juli mánað, og tað er júst um hetta mundi, at ferðafólk av álvara leita sær til landi, og tí kundi tað ikki verið verri.

– Fyri at gera ilt verri, so hevur veðrið í summar eisini verið serstakliga vánaligt. Eg haldi ikki, at eg minnist eitt summar, har tað hevur viðrað so illa, sigur Palli Lamhauge.

Tá ið vit tosaðu við Palla fyrrapartin mikudagin, greiddi hann frá, at hann skuldi ein túr seinni á degnum, men at farandi ikki var undir bjørgini.

– Tá ið so er, at veðrið ikki er til at fara undir bjørgini, so boða vit fólki frá beinanvegin og geva teimum reellar upplýsingar. Í hesum førinum er talan um ein skúlaflokk, og vit fara ein túr út í sundið, har tað viðrar væl. Vit sigla til Slættanesar, og eg havi eisini nakrar tráður í bátinum, so tey kunnu sleppa at royna seg, sigur Palli Lamhauge.

## Miseydnað Travel Mart

Herfyri var Palli Lamhauge saman við øðrum føroyskum ferðavinnufólki á árligu Vest Norden Travel Mart ráðstevna, har keyparar úr øllum heiminum koma at vita, hvat ferðavinnan í Føroyum, Íslandi og Grønlandi hevur at bjóða.

Vanliga hevur ferðavinnustevnan verða hildin í hesum trimum londunum, men í ár var hon á den nordatlantiske brygge í Keypmannahavn.

Palli Lamhauge heldur, at ferðavinnustevnan í ár var ógvuliga vánalig, og tað er fyrst og fremst tí, at hon var so illa fyriskipað, og tí kom lítið burtur úr í ár.



*Hóast tað eru nærum tríggir mánaðar, síðani Silja Star rendi á og fekk stóran skaða, er ferðamannabáturin framvegis ikki liðugt umvældur.*

SPEKT | statsaut. revisorar

Correspondent Firm of *KPMG* International a Swiss Cooperation

## Stjóri til Framtaksgrunn Føroya

Fyri Framtaksgrunnin verður søkt eftir stjóra at byrja skjótast til ber.

**Um Framtaksgrunnin**

Framtaksgrunnur Føroya er ein vinnurekandi grunnur, hvørs virksemi fevnir um at gera íløgur í nýggj ella víðkað vinnutiltøk í Føroyum. Íløgurnar skulu hava eitt langsiktað kapitalavkast, ið stendur mát við váðan. Eisini leggur Framtaksgrunnurin dent á verkætlanir við høgum vitanarinnihaldi.

Framtaksgrunnurin er í løtuni partaeigari í 15 føroyskum fyritøkum.

Framtaksgrunnurin verður stjórnaður av einari fimm-mannanevnd, harav teir fýra verða valdir av Føroya Landsstýri. Fimti nevndarlimurin verður valdur av teimum sitandi limunum.

**Starvið**

Stjórin hevur ábyrgdina av dagligu leiðsluni av Framtaksgrunni Føroya við tilvísing til nevndina.

Stjórin skal í neyvum samstarvi við nevndina hava ábyrgdina av dagligu leiðsluni av rakstri grunnsins, herundir viðgera íløguumsóknir umframt røkta verandi íløgur.

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu.

**Umsøkjarin**

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin:

- hevur hollan ástøðiligan og praktiskan kunnleika til roknskap og fíggjarviðurskifti
- hevur hollan kunnleika til vinnu- og búskaparlig viðurskifti í Føroyum
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góð samstarvsevni

**Umsóknir**

Umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndir skal sendast til SPEKT statsaut. revisorar Sp/f í seinasta lagi 10. oktober 2005.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Árna Ellefsen á telefon 34 34 45 ella 54 34 45.

Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

SPEKT statsaut. revisorar Sp/f.
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo

Staravegur 17
Postboks 3258
FO-110 Tórshavn
Telefon 34 34 34
Telefax 34 34 35

Heiðavegur 15
Postboks 190
FO-600 Saltangará
Telefon 474 474
Telefax 474 475

TEAM85




**Seinasta freist at lata broytingar inn til telefonbókina 2006 er týsdagin 1. nov. 2005**

**Í mars 2006 verður telefonbókin borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum. Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt.**

**Hvítu síður**

Týsdagin 1. november 2005 er seinasta freist at koma við rættingum til Hvítu síður í Telefonbókini fyri ár 2006 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 676 í Telefonbókini 2005,og skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 79 68.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari við undirstrikingum, eykaupptøkum og/ella undirupptøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er kr. 2.000,00 (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

**Gulu síður**

Týsdagin 1. november 2005 er seinasta freist at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

**Prísir:**

| | | |
|---|---|---|
| (A) Standardlýsing .................................. | kr. | 700,00 |
| (B) Innramming ...................................... | kr. | 800,00 |
| (E) Grafisk lýsing fyri mm (min. 30 mm) . | kr. | 25,00 |

(sí dømi á s. 674 í Telefonbókini 2005)

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/rættingarblað til Gulu síður er á síðu 675 í telefonbókini 2005, og skal sendast til:
Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn, ella faks 32 11 66.
**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

tel 30 30 30 www.tele.fo www.nummar.fo · info@nummar.fo - www.gulu.fo · info@gulu.fo FØROYA TELE